

Mynd: BG Group

# Sølan av BG Group gevur norska oljugrunninum milliardir

**Jógvan Hugo Gardar**

09.04.2015 - 08:25

Oljan.fo

Partaeigararnir í BG Group koma at fáa heilt fitt á bók, tá hollendska oljufyritøkan Shell keypir bretska felagið. Størsti eigarin er norski oljugrunnurin, ið eigur 5,05 prosent av partabrøvunum í BG Group.

Nú avtala er gjørd um at selja bretska felagið til Shell, fyri ein prís sum liggur 50 prosent omanfyri marknaðarvirði á BG Group, so kann norski oljugrunnurin rokna við at fáa góðar 23 milliardir danskar krónur inn á bók, skrivar E24.